# Eivør við besta jólalagnum

**Enn einaferð rakar Eivør íslendsku tindarnar. Hesa ferð við nýggja jólalag sínum, sum er við í kappingini um at gerast ársins jólalag**

EIVØR
*Jákup Mørk*



*Lagið, sum Eivør smíðaði eftir umbøn frá Langholtskórinum í Reykjavík, er nú við í finaluni um besta jólasangin*

Á jólakonsertunum, sum vórðu hildnar kring landið seinasta vikuskifti, høvdu føroyingar møguleikan at hoyra nýggja jólalagi hjá Eivør. Eitt lag, sum hon hevur smíðað eftir umbøn frá Langholtskórinum í Reykjavík.

Í Íslandi verður á hvørjum ári skipað fyri kapping, har besta jólalagið skal kjósast, og Langholtskórið hevði eisini sent sítt jólaískoyti til hesa kapping.

Nú eru so bara seks løg eftir - og lagið hjá Eivør, Jólanótt, er enn við í kappingini.

Í gjárkvøldi høvdu íslendskir sjónvarpshyggjarar møguleika at lurta eftir teimum seks løgunum, soleiðis at hesi nú kunnu taka støðu til, hvat lag skal fáa teirra atkvøðu. Tað eru nevnliga hyggjarar og lurtarar, sum gera av, hvat lag verður kosið sum hitt besta, og eisini føroyingar kunnu taka lut í hesi atkvøðugreiðslu.

Á slóðini, http://www.ruv.is/main/view.jsp?branch=4807772, ber til at lurta eftir teimum seks løgunum, eins og atkvøður eisini verða givnar á hesi síðuni.

Mánadagin komandi verður so almannakunngjørt, hvat lag fær heitið sum ársins jólasangur í Íslandi.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur upp í skrið av norði og útnyrðingi, 15-20 m/s. Nakað av vátaslettingini, kava og heglingi. Út á dagin linkar hann vindin, og um kvøldið stívt andøvsgul til strúkur í vindi, 8-14 m/s. Hitin um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og okkurt kavaælið, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.




**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og vátakavi ella regn. Mánadagin minni vindur av útnyrðingi og okkurt regnælið. Hitin millum 2 og 6 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 8 |
| London | -- |
| Tromsø | -1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 13 |
| Athen | -- |
| Malta | 17 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | -- |
| New York | -4 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst tekur seg upp sunnan fyri Ísland og fer eystureftir. Tað dregur eisini kalda luft móti Føroyum. Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og viknar.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa flytur seg frá Noreg og eystureftir. Tilhoyrandi hitabrúgvin hevur regn við sær. Eitt hátrýst um 1045 hPa vestan fyri Írland ferðast móti vestri. Eitt annað hátrýst, um 1015 hPa, norðan fyri Ísland ferðast í ein landssynning, og køld luft streymar yvir Førar av vestri og útnyrðingi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/12 kl. 06[00]– 15/12. 06[00]. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 14/12 kl. 06[00]– 15/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 37,1 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

5. desember Mánin næstur jørðini
15. desember Fullmáni
21 desember Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. Des | 06.06 | 18.31 | 05.06 | 17.31 | 05.21 | 17.46 | 08.06 | 20.31 | 09.06 | 21.31 | 04.21 | 16.46 | 03.21 | 15.46 | 06.21 | 18.46 | 07.21 | 19.46 | 05.51 | 18.16 | 07.06 | 19.31 |
| 16. Des | 06.56 | 19.22 | 05.56 | 18.22 | 06.11 | 18.37 | 08.56 | 21.22 | 09.56 | 22.22 | 05.11 | 17.37 | 04.11 | 16.37 | 07.11 | 19.37 | 08.11 | 20.37 | 06.41 | 19.07 | 07.56 | 20.22 |
| 17. Des | 07.48 | 20.12 | 06.48 | 19.12 | 07.03 | 19.27 | 09.48 | 22.12 | 10.48 | 23.12 | 06.03 | 18.27 | 05.03 | 17.27 | 08.03 | 20.27 | 09.03 | 21.27 | 07.33 | 19.57 | 08.48 | 21.12 |
| 18. Des | 08.37 | 21.00 | 07.37 | 20.00 | 07.52 | 20.15 | 10.37 | 23.00 | 11.37 | - | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 | 08.22 | 20.45 | 09.37 | 22.00 |
| 19. Des | 09.23 | 21.44 | 08.23 | 20.44 | 08.38 | 20.59 | 11.23 | 23.44 | 00.00 | 12.23 | 07.38 | 19.59 | 06.38 | 18.59 | 09.38 | 21.59 | 10.38 | 22.59 | 09.08 | 21.29 | 10.23 | 22.44 |